# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

# Audi A5 og Kia ProCeed




Hesin Audi A5 er tann einasti av sínum slagi í landinum. Ein væl útgjørdur coupé við t.d. Xenon forlyktum, sport undirvogni og TFSI bensinmotori við 170 hk



Audi A5 er ein flottur coupé, sum er teknaður av italska designaranum Walter da Silva



A5 innan í besta Audi stíli við t.d. sport leðursetrum við hita og informatiónsdisplay í litum



Kia Pro Ceed er ein sportligur hatcback við trimum hurðum. Hesin hevur 1,6 litra CRDI dieselmotor við 115 hk



Pro Ceed hevur øðrvísi og meira sportligt design aftan enn Kia Ceed við fimm hurðum



Kia Pro Ceed innan

**Í sendingini Bylgjan hjá Kringvarpinum hesa vikuna vórðu tveir bilar ummældir: Audi A5 og Kia Pro Ceed, annar ein flottur coupé og hin ein sportligur hatchback við trimum hurðum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Bilarnir sum vórðu ummældir í sendingini Bylgjan hjá Kringvarpinum mikudagin 19. mars vóru Kia Pro Ceed við 1,6 litra dieselmotori við 115 hk og Audi A5 við 1,8 litra bensinmotori og 170 hk.

## Audi A5

Fyrri bilurin sum varð royndarkoyrdur var Audi A5, ið er ein flottur coupé, sum er teknaður av italska designaranum Walter da Silva, sum nú er designstjóri hjá VW-konsernini.

A5 er ein hátøknilig konstruktión allan vegin ígjøgnum við øllum innbygdum trygdarskipanum. Ein dreymur at koyra við komfort og sportligum koyrieginleikum í serklassa.

Motorurin er ein 1,8 litra TFSI við 170 hk og snúningsmomenti upp á 270 Nm beinleiðis innspræning og turbo. Koyrir frá 0-100 km/t upp á 8,4 sekund. Viðførisrúm 455 litrar.

Ein Audi A5 1,8 TFSI kostar frá 428.000. Bilurin, sum varð royndarkoyrdur, hevði nógva eykaútgerð sum t.d. sport leðursetur við hita, xenon forlyktir, sport undirvogn, parkeringsskipan aftan og ferðpilot. Við allari útgerðini kostar bilurin 539.000 krónur.

Bilurin kann síggjast hjá Bilasøluni í Hoyvík.

## Kia Pro Ceed

Koreanararnir tóku allan bilheimin á bóli, tá teir í fjør komu á marknaðin við Kia Ceed við 7 ára garanti. Bilurin er gjørdur í Evropa til evropearar á eini av heimsins mest framkomnu bilverksmiðjum í Slovakia.

Kia Ceed fær sera góð skotsmál frá evropeiskum motorjournalistum og t.d. 6 stjørnur frá FDM. Bilurin er sera væl gjørdur, og kvaliteturin merkist allan vegin ígjøgnum, bæði innan og uttan. Kia Pro Ceed er í veruleikanum ein Kia Ceed við trimum hurðum, men hann hevur øðrvísi og meira sportligt design aftan.

Bilurin, sum varð royndarkoyrdur, var ein Pro Ceed við 1,6 litra motori við 115 hk og kostar kr. 239.000. Bilurin kann síggjast og roynast hjá Berg Motors á Hálsi.

mg